# Tiltøk

**Gudstænastur 18. apríl**
**Havnar kirkja:** kl. 11
Uni Næs, talvan gongur fyri Bláa Kross í Føroyum
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11
Lestur, talvan gongur fyri Bláa Kross í Føroyum. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
**Vesturkirkjan:** kl. 11
Derhard Jógvansson
**Hests kirkja:** kl. 12
Bergur Debes Joensen
**Kollafjørður:** kl. 11
Theodor E. D. Olsen
**Vestmannu kirkja:** kl. 11
Henning Bøgesvang, altarg.
**Tvøroyri:** kl. 11
Jónsvein Bech.
**Hvalba:** kl. 12.30
Jónsvein Bech
**Christianskirkjan:** kl. 11
Hanus á Gørðum
**Hósvíkar kirkja:** kl. 11
Henning Bøgesvang, altarg.
**Árnfjarða kirkja:** kl. 11
Magnus Brahé Jørgensen.
**Kunoyar kirkja:** kl. 12.15
Magnus Brahé Jørgensen
**Fríðrikskirkjan:** kl. 11
Martin R. Jacobsen, altarg.
**Bøur:** kl. 11
David Johannesen
**Eiði:** kl. 12
Emil Olsen, messa
**Glyvra kirkja:** kl. 11
Meinhard Bjartalíð, konfirmatión
**Mikladals kirkja:** kl. 12
Heri Kjærbo
**Viðareiði:**
Elsa Funding, altarg.
**Skúvoy:** kl. 12
Jákup R. Hansen, altarg.
**Vestmanna:** kl 11
Inga Poulsen Dam

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. hámessa v/Michael Bradley, prestur í Mariukirkjuni. Sunnudagsskúli kl. 14. www.katolsk.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Kl. 11 Gudstjen. Odd Fuglestad.

**Vesturkirkjan**
Mikuvøldið 21. apríl kl. 19.30 verður fyrilestur við orðum og myndum. Asta og Bergur D. Joensen siga frá hendingum á heimsferð teirra 2007-2008 í m.a. Nigeria, USA, Papua Nýguinea, Kina og Ísrael. Høvi til spurningar. Øll eru vælkomin.

**Gongutúrur sunnudagin**
Sunnudagin kl. 10 verður gongutúrur: Nykatjørn, Skeiðsskarð, Stiðjafall, og niðan Fólkaskarð, Norðradali. Hetta er ein langur og í støðum tungur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við. Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

**Samkoman Marknagil Fjalsgøta 2, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting. Sunnudagsskúli kl. 12. Kl. 18 Evangeliskt møti Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið møti kl. 18 v/Sigurd Sørensen

**Aglow Tórshavn**
Møti verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30 har Elsa í Skorini talar og Maria Andersen Hentze syngur. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 18 Evangelisk møti. Øll eru vælkomin.

**KFUMog KFUK í Havn**
Mánadagin 19. apríl kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Jónhildu og Gulak Hansen.

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Barnaansing er meðan møti er.
Mánakvøldið Kl. 20 Kvinnumøti. Marita Guttesen og Marjun Gunnarson greiða frá túrinum, tær vóru við Juvel í Grønlandi í fjør. www.ebenezer.fo

**Lívdin**
Fríggjakvøldið kl. 21 á Brekku 3, Hoyvík. Hetta er GAME-NIGHT fyri ung. www.ung.livdin.fo
Leygarkvøldið
Hoyvíkingar - Komið, síggið, hoyrið og upplivið! Vit bjóða tær til eina hugnaløtu í Skúlanum við Løgmannabreyt. kl. 20. Á skránni verður millum annað: Framløga, búktalari, solosangur, hugleiðing um Lívsgleði, listaframsýning, frásagnir. Kaffi og okkurt gott til góman verður eisini.
Sunnudagur
Familjumøtið kl. 10.30 tilbiðjanarmøti kl. 11 og lovsongur og tala kl. 12. Sunnudagsskúli og Ung-lív kl. 12. Á familjumøtinum verður tiltak fyri børn, Guttorm Joensen skipar fyri. Tá tilbiðanarmøtið byrjar kl. 11, kunnu børnini fara í barnaansing og kreativ tiltøk. Á seinna møtinum, sum er kl. 12, talar Jógvan Zachariassen um "Lívdin - Hvat vilja vit?"
Týsdagur 20. apríl Bønarløta kl. 20 á Brekku 3, Hoyvík

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Marju Lamhauge, Lambareiði

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/Bogi Olsen. Sangur, Argjakórið og insavnan til útimissión. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, børn 8-12 ár. Øll børn verða koyrd heim eftir møtið. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti. Verið vælkomin.
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl. 12 Felagsmøti við Getsemane úr Klaksvík. Ábit verður at fáa eftir møtið. Barnanasing er fyri smærri børn undir møtinum. www.immanuel.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, John Fonsdal talar.
Mánakvøldið kl. 20 lovsangs- og bønarløta. www.gospel.fo

**Filadelfia Tórshavn**
Leygarkvøldið kl. 21 Flare Share
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, Sámuel Jacobsen talar. www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn Tórsgøta 19**
Leygarkvøldið kl. 19 aglow møti
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ sunnudagsskúla. Kl. 17.30 Bønarmøti. Kl. 18 Møti v/solidat Eingrím Holm talar

**Filadelfia Vágar**
Sunnudagin kl. 11
Møti við Kirstin Jensen. Sunnudagsskúli kl. 11.30. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Bethel, Vágur**
Leygarkvøldið Kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin

**Kedron, Vágar**
Møtir og tiltøk hjá samkomuni eru at síggja á heimasíðu okkara. Øll eru hjartaliga vælkomin í KEDRON til okkara møtir og tiltøk. Vitja heimasíðu okkara fyri at síggja hesi. www.kedron.fo. Hevur tú ikki hendan møguleikan, kunna tygum ogna tygum KEDRON-tíðindi. Verið hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin Vágur**
Fríggjadagin kl. 9.30 orðið á borðið.
Sunnudagin kl. 11 sunnudagsskúli/morgunmøti, kl. 18 Møti v/ Ben Eli og Eyð v/fleiri.
Mánakvøldið kl. 20 bønarløta týsdagin kl. 9.30 orðið á borðið kl. 20 heimaforbundi.

**Missiónshúsið í Skopun**
Missiónsvikan verður í døgunum 15.-18. apríl.
*Missiónsvikan:*
Fríggjakvøldið kl. 19 møti v/ Sylverius Jacobsen, Niclas og Gunnhild syngja. Leygardagin kl. 19 møti v/Maritu og Egin Markná, Oasubrøðurnir syngja. Innsavnan til húsið.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Hjalgrim Davidsen og Thomas Juul Askham, Manskórið í Sandoynni syngur. Innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti í missiónshúsinum við Hera Kjærbo, boðanarleiðara. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúlin og møti verða avlýst vegna legu í Nesvík. Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20 v/Øssur Kjølbro. Bønarløta verður hóskvøldið kl. 19.30
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúlin. Kl. 18 verður møtið við John Myllhamar.
Týskvøldið 20. apríl kl. 20 verður bíblibímið Áps. Kap. 10. Øll eru vælkomin.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting.
Týskvøldið kl. 20: Bønar-og uppbyggingarmøti.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 verður Sunnudagsskúli. Kl. 19 møtið við Snorra Brend.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við ungdómskórinum úr Oasuni.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Jastrid Høj o.fl. Sangur við Oddbjørg Poulsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Tabor, Toftir**
Leygarkvøldið fara vit til Strendur á BKU-ungdómsmøti. Bilar koyra frá missiónshúsinum kl. 21.15. Hjartaliga vælkomin

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/Símun Jacobsen
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti v/ Jeffri Johannesen, Evni: Jesus sigur: "eg eri vegurin!" Bólkaarbeiði aftaná
Sunnudagin kl. 17
Møti v/ Sigga Skoradal Sunnudagsskúli í kjallarinum

**Aglow møti verður í Missiónshúsinum í Oyndarfirði**
Týskvøldið 20. apríl kl. 19.30 Vælkomnar allar gentur og kvinnur. Aglow Eysturoy

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v. Sólbjørg Símunarson: Evni: Sangirnir hjá Jóh, Mortensen, trúboära. Innsavnan.

**Landsstevnan hjá Bláa Krossi**
*verður í Bygdarhúsinum á Strondum frá 16. – 18 apríl.*
Fríggjadagin kl. 18 Håbets fest kl. 21 sangløtt
Leygardagin kl. 10.30 Fundur evni: Menniskjaáskoðan og diakoniáskoðan. Framløga v/Hjalmar Hansen aðalskrivari. Kl. 14 Aðalfundur. Kl. 16.30 Orðaskifti evni: Diakoni í meinigheitini. Upplegg frá Tummas Jacobsen, Una Næs, Ingrid Hansen og Jens Bech. Sangur: Jógvan, Olga og Sirikit Kl. 19.30 kvøldseta. Jógvan Fríðriksson, biskupur hugleiðir um spurningin: Hvar er bróður tín? Sangur: Manskórið í Fuglafirði. Frásøgn frá aerbeiðinum hjá Bláa Krossi í India. Kl. 22 Ungdómstiltak
Sunnudagin kl. 12 Altargangsgudstænasta í Sjóvar Kirkju v/ Sverra Steinhólm. Kl. 15 Familjutiltak í Bygdarhúsinum. Kl. 18 Blákrossmøti evni: Teir komu berandi við einum manni. Sólrun Poulsen talar. Sangur Gospel Kids. Frágreiðin um arbeiðið hjá Bláa Krossi í Føroyum. Øll eru vælkomin til tiltøkini.

**Missiónshúsið á Selatrað**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Talari Dánjal Pauli Dalbø og Ólfríða Johansen. Ung av Strondum og onnur syngja.

**Hvannasunds skúli**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Ásvald Thomsen talar. Øll eru vælkomin

**Soli deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Mirjam og Victor Carlsen.

**Aglow Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria týskvøldið 20. apríl kl. 20. Møti er serliga ætla ungum gentum, men allar kvinnur og ungar gentir eru vælkomnar. nevndin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin
kl. 14.00 Sunnudagsskúli
kl. 17.30 Bønarløta
kl. 18.00 Møti Ólavur Jóhannessen. Innsavnan til Útimissión.
Kl. 21 Ungdómsmøti

**Konsert í Christianskirkjuni**
fríggjakvøldið 16. apríl kl. 19.30. Konsert við Ken Jones og Birgitte Schnakenburg.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Sunnukvøldið er onki møti vegna samkomutúr til Immanuel í Havn.
Hvønn gerandismorgun kl. 06.15 er morgunbøn.

**Missiónsvika í Fámjin**
Fríggjakvøldið kl. 20 møti í kirkjuni Katrin Mortensen talar, Mourits Viderø syngur og Bergur Stórhamar endar
Leygarkvøldið kl. 20 møti í kirkjuni Josvein Hovgaard o.o. tala, Kórið í Porkeri syngur
Sunnukvøldið kl. 18 møti í kirkjuni Jógvan Højgaard talar, Kórið á Tvøroyri syngur, innsavnan til Heimamissiónina

**Aglow Suðuroy**
Fundur verður í Fylking á Tvøroyri mánakvøldið 19. apríl kl. 19.30. Evnið er "Gud í gerandisdegnum". Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Betania Sumba**
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti. Øll eru vælkomin

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*Tlf: 316491/286491*
*tilhald@torshavn.fo*
*Opið er mánadag til hósdag kl. 09-17 og fríggjadag kl. 09-16. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Mánadagin
Kl. 9 Horn- og beinarbeiðið, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 10 Fimleikur, Grete Ellingsgaard.
Kl. 14 Kortspæl o.o. spøl.
**Túrur** mikudagin 28. apríl kl. 13 úr Steinatúni til Gjáar. Drekkamunn og pannukøkur á Gjáargarði, vitja urtagarð og spáka í bygdini. Aftur í Havnini kl. 18. Tilmelding: 316491. Kostnaður 100,- Gjaldast mánadagin 26. apríl.
Týsdagin
Kl. 10 Sangur, Árni Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
**OBS!** Kl. 15 Laura Joensen, sjónleikari hugleiðir um Jóhannu Mariu. Skylv Hansen og framførir brot "Logi logi eldur mín". Øll eru vælkomin.
Mikudagin
Kl. 9 Maskinbinding, Marita Guttesen.
Kl. 9 Veving, Joana Bjarnastein.
Kl. 9 Bindiklubburin vit haldia til á veghæddini.
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard.
**Framsýning** av vetrararbeiðinum í horn og beini verður í kjallaranum í dag og til og við mikudagin 28. apríl 14-17. Fríggjadag 14-16.
Kl. 14 Túrur: Norðasta Norn. Øll eru vælkomin. Randi og Elisabeth, fysioterapeutar.
Hósdagur
Kl. 9-11.15 Bólkur 1, Tekstvíðgerð grundskeið, Páll Poulsen.
Kl. 11.45-14 Bólkur 2, Tekstvíðgerð víðkað skeið, Páll Poulsen.
Kl. 14.15-16.30 Bólkur 3, Leita og samskifta á alnótini.
Kl. 10 Fimleikur, Greta Ellingsgaard.
Kl. 11 Lesibólkurin: Vit lesa greinar hjá Ebbu Hentzu. Vit halda til á bókasavninum. Øll áhugaði eru vælkomin.
Kl. 14-16 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen.
Fríggjadagin
Kl. 9 Bindiklubbur vit halda til á veghæddini. Øll eru hjartaliga vælkomin
Kl. 14-16 Prát
**Flaggdagin** sunnudagin 25. apríl verður Tilhaldið karmur um nýggju bókina hjá Birgari Johannesen: »Tórshavn árið 1900« kl. 14-18. Øll eru hjartaliga vælkomin
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Pensionistafelagið í Havn**
*Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Tlf. 222733 finnurj@post.olivant.fo*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Gøtubrá**
Opið týs- og hósdag kl. 15-18